# Samstarvsfólk til Framtaksgrunn Føroya

Søkt verður hervið eftir samstarvsfólki til Framtaksgrunn Føroya.

Viðkomandi kemur saman við stjóra grunnsins at luttaka í dagligu uppgávunum, bæði viðvíkjandi verkætlanum, grunnurin hevur sett pening í, og í viðgerðini av nýggjum verkætlanum.

**Starvið**
Við tilvísing til stjóran, kemur samstarvsfelagin at luttaka í dagliga arbeiði grunnsins. Framtaksgrunnur Føroya er vinnurekandi grunnur. Tvs. at íløgur, ið verða gjørdar, verða mettar út frá handilsligum grundreglum. Út frá hesi aðalreglu verður mett um nýggjar verkætlanir og neyvar uppfylgingar gjørdar av framdum íløgum.

**Høvuðsuppgávur**
- Fyriskipa partar av skrivstovu grunnsins.
- Verða við at meta um nýggjar verkætlanir.
- Finna fram nýggjar verkætlanir.
- Luttaka í viðgerðini av verkætlanum.
- Uppfylging av gjørdum íløgum.
- Skjalaviðgerð.

**Persónurin**
Nýggja samstarvsfólkið skal vera røkið og hava innlit í føroyskt vinnulív. Harafturat er neyðugt at hann dugir væl at skyna á vinnuligum møguleikum í Føroyum. Neyðugt er eisini at nýggja starvsfólkið hevur góð samstarvsevni og lætt at samskifta við vinnulívsfólk.

**Førleiki**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur vinnuligar royndir og búskaparligan førleika at meta um nýggjar verkætlanir umframt at vera analytiskur.

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt sera mennandi og áhugavert starv. Framtaksgrunni Føroya, ið er sera sentralt plaseraður í føroysku vinnuni og sum settað fólkið fær, saman við stjóranum, møguleika at ávirka komandi árini. Lønin verður sett eftir útbúgvingum og royndum.

**Umsóknin**
Umsókn við avriti av prógvum og lýsing av arbeiðsroyndum verður at senda til Framtaksgrunn Føroya, Bøkjarabrekka 9, Postrúm 3157, í sanasta lagi 24. sept. 2001. Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Jens Kára Vilhelm, stjóra á tlf.: 31 59 66 ella 21 59 66.

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, ið hevur sum endamál, at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsiktað kapitalavkast, ið stendur mát við váðan. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir við høgum vitanarinnihaldi.
Íløgan hjá Framtaksgrunninum kann verða ílagdur partapeningur ella sum ábyrgdarlán. Tá íløgan verður íløgd sum partapeningur, skal Framtaksgrunnurin avhenda síni partabrøv tá rakstur og felag metast at hvíla á einum burðardyggum grundarlag.


Sosialurin

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820


## Tvingsilssøla

**Hósdagin 27. september 2001, kl. 9.45** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 68a, Haraldssund.**

Ognin er eitt óbygt byggibúgvið grundstykki, til støddar 520 m² samb. tingblaðnum.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20010130)**, sum kann geva nærri upplýsingar.




Starvsfólk til kundaavgreiðslu

Flogfelag Føroya søkir starvsfólk at arbeiða fulla tíð. Arbeiðið umfatar telefon- og kundaavgreiðslu á deildini hjá Flogfelag Føroya á Áarvegnum.

Vit vænta at tú hevur:
• royndir innan ferðavinnu
• royndir við AMADEUS bíleggingarskipan
• dugir væl danskt og enskt
• hevur áhuga fyri teldu
• ert ágrýtin og kundavinaligur

Til tíðir hava vit nógv at gera, og vænta at tú klárar arbeiðstrýst.

Heldur tú hetta vera nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn, ið verður viðgjørd í trúnaði. Starvið verður at seta sum skjótast.

Flogfelag Føroya
Boks 3225
Fo-100 Tórshavn
Skal stílast til: Una Danielsen

petur & petur • 320870

FLOGFELAG FØROYA


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2570, Sp/f Reno-Vent, 100 Tórshavn.

Nýggj adressa: Tórsbyrgi 36, Box 3133, 110 Tórshavn
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anny Malena Nielsen, 690 Oyndarfjørður (formaður)
Innkomin sum formaður: Fróði Rógvi Nielsen, 690 Oyndarfjørður
Innkomin í nevndina: Hans Jákup Olsen, Tórsbyrgi 36, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Fróði Rógvi Nielsen, 690 Oyndaarfjørður
Innkomin sum stjóri: Hans Jákup Olsen, Tórsbyrgi 36, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC








Dansiskeið



Kom og Dansa skipar 18.-23. september fyri dansiskeiðum saman við instruktørum frá **Komið og Dansið í Íslandi.**

Skeiðini eru Grundskeið í Rock'n roll og sving.
Skeiðini verða soleiðis:
**Rockesving**
Týsdag 18- Mikudag 19/9 kl 20.00-22.30
**Dansesving**
Hósdag 20-Fríggjadag 21/9 kl 20.00-22.30
**Blues Boogie**
Leygardag 22., sunnudag 23/9 kl. 13.30-16.00.

Einstakligar eins og pør eru vælkomin.
Skeiðini verða í IOGT Húsinum Tinghúsvegur 18.
Tekning í Kunningarstovuni tlf 315788
Kostnaður fyri hvørt skeiðið 150 kr.

**Kom og Dansa**

Mazda 323F



Ein sera væl viðfarin Mazda 323F 1.5 90 HK til sølu, bert ein eigari, ikki roykt í bilinum

Eykaútgerð:
Tokulyktir, spoilara, lakkeraðar stenklappar, sentrallás við fjarstýring, 15" sportfelgur og breið dekk, píkadekk á felgum fylgja við, CD spælara, sentrallás við fjarstýring, bilurin er senkaður

Bilurin hevur koyrt km 38.000, er frá apríl 99, til sølu fyri kr. 125.000,-

**Tel. 317326 - 317556**

Ford Focus Ghia
- Motorur 1,600
- Fra december 1998
- ikki roykjarabilur



**Kostnaður kr 125.000**

Ring tlf 223369

Sosialurin
-tað loysir seg

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820


## Seyðakjøtprísurin 2001/2002

Tað verður hervið kunngjørt, at minstiprísurin fyri seyðakjøt fyri 2001/2002 er ásettur at verða:

**kr: 60,00 fyri kilo.**
**Prísurin er íroknaður MVG.**

**Bóndafelag Føroya**

## Kvinnufelagið

Aðalfundur verður mánakvøldið 1. oktober kl. 20 í Mettustovu. Uppskot til aðalfundin skal nevndin hava í seinasta lagi 23. september.

Er aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hildin beint aftaná.

**Kvinnufelagið**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 736, P/F Com Data 736, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 04.05.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 1.029.000,00 til kr. 2.058.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 1.029.000,00 til kurs 150.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2809, P/F Vágatunnilin, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 11.01.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 20.000.000,00 til kr. 80.300.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 20.000.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle

# Venjingartímar hjá H 71 2001/2002

Nú byrjar venjingin aftur hjá H 71. Venjingartímarnir hjá ymsu liðunum síggjast á talvuni niðanfyri. Øll eru vælkomin, eisini nýggir limir. Venjingin byrjar mándagin tann 10. september.

Hesar tíðir fara at broytast á jólum, tá Høllin í Hoyvík væntandi verður klár.

### Ítróttarhøllin á Nabb

| Klokkan | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|---|---|
| 15.00 - 16.00 | | | | | Gentur 12 og 14 ár |
| 16.00 - 17.00 | | | | | Dreingir 10 ár |
| 17.00 - 18.00 | | | | | |
| 18.00 - 19.00 | | | | | |
| 19.00 - 20.00 | Dreingir 12 ár | | | | Kvinnu-unglingar |
| 20.00 - 21.00 | Mansunglingar & D 16 | | H 71 | | Dreingir 14 |
| 21.00 - 22.00 | Menn & mans-unglingar | | Dreingir 14 ár | | Menn & mansunglingar |
| 22.00 - 23.00 | Menn & mans-unglingar | | Menn & mans-unglingar | | Menn & mansunglingar |

### Fimleikarhøllin í Hoyvík

| Klokkan | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|---|---|
| 17.00 - 18.00 | Børn upp til 1. fl. | Gentur 12 og 14 ár | | Dreingir 10 ár | |
| 18.00 - 19.00 | | Gentur 10 ár | Dreingir 12 ár | Dreingir 10 ár | |
| 19.00 - 20.00 | Gentur 10 ár | H 71 | | Menn & mans-unglingar | |
| 20.00 - 21.00 | | | Kvinnu-unglingar | Dreingir 14 ár | |

**H 71 - Hondbóltsfelagið í Hoyvík**

Eru spurningar ber til at ringja til Andras 211 242, Egin 21 95 12 ella Jógvan Elias 21 98 22 eftir klokkan 18.00.